## Brown á veg út

Var parlamentsval í Bretlandi í dag, hevði tann konservativi andstøðuflokkurin vunnið so dyggan sigur, at hann hevði havt meiri enn 100 tinglimir í meiriluta. Tað vísir ein kanning, sum blaðið The Guardian hevur latið gera. Kanningin sigur, at tann konservativi flokkurin hevði fingið 44 prosent av atkvøðunum. Haraftúrímóti hevði Arbeiðaraflokkurin hjá Gordon Brown, forsætisráðharra bara fingið 27 prosent. Tann triði stóri flokkurin, Tey Liberalu, hevði fingið 18 prosent. Parlamentsval verður í Bretlandi í seinasta lagi í juni næsta ár.




## Lesandi hermenn

Í einari roynd at útvega hermegini fleiri fólk við góðari útbúgving og fyri at tálma tí støðugt veksandi arbeiðsloysinum millum ungfólk hava myndugleikarnir í Kina gjørt av at geva ungum lesandi høvi at velja maskinbyrsuna fram um telduna. Ein kanning hevur víst, at umleið hálv onnur millión lesandi eru til reiðar at taka av tilboðnum frá herinum, men sum skilst sleppa bara 130.000 ígjøgnum nálareygað í fyrsta umfari. Eftir tilboðnum frá herleiðsluni fáa tey ungu tilboð um fast arbeiði í herinum ella løgregluni aftan á trý ára royndartíð.

# Gott at útveksla sjónarmið

**Sum altíð, tá fyrilestrar verða hildnir, oysa fyrilestrarhaldararnir av sínum egnu royndum. Tað gjørdi Nels Christian Nolsø eisini á FaroEXPO í gjár**

FAROEXPO
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




*Niels Christian Nolsø helt fyrilestur um at taka rættar avgerðir*

Niels Christian Nolsø var ein av fyrilestrarhaldarunnum á FaroEXPO 2009, og hann hevði fingið eina bundna yvirskrift at tosa út frá.

- Mær var tillutað eitt evni, sum eitur rættar avgerðir, og tá eg so hugsaði um, hvat eg skuldi siga um tað, kom eg til ta niðurstøðu, at sga søguna, sum eg kenni best, og tað er um fyritøkuna, sum eg eri stjóri fyri, Elektron, sigur Niels Christian Nolsø.

Stjórin á Elektron sigur, at hann valdi at siga søguna um Elektron og um at taka, um ikki rættar avgerðir, so avgerðir, ið hava verið neyðugar at tikið, tí at kringumstøðurnar hjá fyritøkuni hava broytt seg dramatiskt.

- Og tað var so tað, ið eg røddi um, sigur Niels Christian Nolsø.

Hann hevur verið stjóri á Elektron í fleiri ár, so hvussu eru umstøðurnar broyttar hesi árini.

- Tey nógvu fyrstu árini var tað eitt framhald av tí, sum var undan, at eg gjørdist stjóri í 1995. Men hesi seinnu árini hava vit arbeitt við at finna eina alternativa loysn fyri pengingastovnarnar, sum standa fyri helminginum av okkara umsetningi, og tann loysnin, sum vit eru komin fram til er, at teir flyta sítt virksemi til Skandinavisk Datacenter í Ballerup, sigur Niels Christian Nolsø.

Og hetta, heldur hann, setir teir yvirfyri einari stórari avbjóðing, og tað er hetta, stjórin á Elektron greiddi frá í sínum fyrilestri.

### Fleiri aspektir

Men hvønn týdning heldur stjórin á Elektron at ein slík ráðstevna sum FaroEXPO hevur fyri Føroyar og føroyskt vinnulív, serliga við atliti til, at fleiri útlendskar fyritøkur eru við á stevnuni.

- Nú havi eg ikki sjálvur luttikið í sjálvum partneriatinum, men ein stevna av slíkum slag er ógvuliga góð og inspirerandi fyri fólk at hoyra, hvussu onnur fólk arbeiða og loysa trupulleikar. Og hetta at útveksla sjónarmið millum fyritøkur og fólk er bara gott, sigur Niels Christian Nolsø.

Fyriskipararnir hava samansjóða eina blanding av fyrilestrarhaldarum við tveimum stjórum, bispi og okkara fremsta skemtara. Hvussu dámar stjóranum á Elektron hesa blandingina.

- Eg haldi, at hon er perfekt, júst ein blanding, sum skal til. Eg kann so til stuttleika siga, at bæði bispur og stóri skemtarin hava luttikið í arbeiðinum hjá Elektron, har vit hava brúkt teir internt eisini. Og hetta vísir bara, at tað eru ymisk aspektir í vinnulívinum, sum kanska kunnu »yvirraska« eitt sindur, sigur Niels Christian Nolø, stjóri á Elektron.

# Samskifti grundarsteinur

**Eitt av týdningarmestu amboðunum, ein leiðsla hevur, er samskifti við síni starvsfólk. Millum annað hetta røddi Hákun Djurhuus, stjóri á SEV, um í fyrilestri sínum**

FAROEXPO
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Hákun Durhuus, stjóri á SEV, var fyrsti fyrilestrarhaldarin á ráðstevnuni, og hansara innlegg bar heitið Mennandi leiðsla í verki.

- Fyrilesturin spenti rættiliga breitt. Eg tók útgangsstøði í teimum 10 árunum, eg var stjóri á Føroya Shell, og greiddi frá nógvum praktiskum tingum, sum eg har havi verið ígjøgnum, sigur Hákun Djurhuus.

Hann setti hetta í ein samanhang, har hann dró fleiri ymisk evnir fram.

- Eg tosaði um strategi og um organisatión og um komunikatión, sum er ógvuliga týdningarmikið og tað legði eg stóra herðslu á, sigur Hákun Djurhuus.

Hann sigur, at hetta er eitt týðandi amboð hjá einari leiðslu.

- Ein týðandi partur er menningarsamrøður og motivatión, og tað var líkasum tað, ið eg legði dent á í mínum fyrilestri, sigur Hákun Djurhuus.

Hann tók fram ymisk dømi frá teimum royndum, hann ognaði sær tey tíggju árini, hann var stjóri á Føroya Shell.

### Bispur nógv at geva

Men hvat heldur so stjórin á SEV at luttakararnir kunnu fáa burtur úr einari slíkari ráðstevnu, sum FaroEXPO.

- Heilt ítøkiligt veit eg í hvussu er um eitt, sum eg nevndi, og sum eg meti hevur stóran týdning. Tað kom fram longu tá næsti fyrilestrarhaldari kom á pallin, og har hann tók tað til sín, og tað var hetta ítøkiliga við at lata hurðina standa opna fyri starvsfólkinum, sigur Hákun Djurhuus.

Hann nevndi sjálvur, at hann segði fyri starvsfólki sínum, at hansara hurð altíð var opin, men heilt fysiskt var hon afturlatin. Ikki fyrr enn undangongumaður hansara gjørdi hann varugan við hetta, »vaknaði« hann, og síðani hevur hurðin reint fysiskt staðið opin.

- Og hetta er nakað, vit alla tíðina verða dømd upp á, og hetta er so eitt ítøkiligt ting, ið onkur vil taka við sær herfrá, sigur Hákun Djurhuus.

Tað var sjálvur bispur, sum stjórin á SEV sipaði til, men kann hann geva føroyskum vinnulívið nakað.

- Ja, heilt avgjørt. Hann setir alt í ein annan samanhang, eins og hann er ein ógvuliga stórur kapasitetur innan samskifti, og tað er givið, at har kom nógv gott frá honum, sigur Hákun Djurhuus, stjóri á SEV:




*Hákun Djurhuus, stjóri á SEV, helt fyrilestur um Mennandi leiðslu í verki*